**SEMJA**

**MILLUM**

**REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP**

**OG**

**FØROYA FISKIMANNAFELAG**

Omanfyrinevndu partar eru samdir um at leingja galdandi sáttmálar til 1. mars 2027 við hesum broytingum:

Løn hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Hin 1. mars 2025 | | |
| | Lønin hækkar | 3,92 % |
| Hin 1. mars 2026 | | |
| | Lønin hækkar | 3,87 % |

**Høvuðssáttmálin og frálandasattmálin:**

1. **Eftirløn**

   Eftirlønin hækkar 1. mars 2025 úr 12,5% til 13%.

2. **Kokkar**

   Viðbótin hjá kokkum hækkar við 600 kr. um mánaðin í "Lønartalva fyri dekkarar við farmaskipum" og í "Lønartalva fyri manning við veitingarskipum við ískoytum".
   Í lønartalvuni fyri "Yvirmenn og assistentar við handilsskipum" verður nýggjur bólkur gjørdur fyri kokkar við yvirskriftini "Kokkar við longri útbúgving", har lønin er 600 kr. hægri, enn lønin hjá "Tænastufólk við longri útbúgving".
   Við longri útbúgving er talan um útbúgving sbrt. Yrkisútbúgvingarlógini.

3. **Bátsmenn**

Viðbótin til bátsmenn verður flutt í lønartalvuna, soleiðis at mánaðarlønin hækkar við viðbótini.

4. **Skeiðsútreiðslur**

Í grein 4 verður sett inn nýtt stk. 3, sum sigur:

Fyri skeiðsútreiðslur yvir kr. 15.000, hildnar áðrenn fyrstu 1 árini í starvi hjá reiðaranum, hevur reiðarin rætt at krevja hesar skeiðsútreiðslur aftur frá manningini, um hann sigur seg úr starvi ella av lógligari grund verður burturvístur innan tað fyrsta setanarárið.

Afturgjaldingin kann tó í mesta lagi svara til eina mánaðarløn íalt. Mánaðarlønin er lønin, sum sjófólkið verður lønt við, tá tað sigur seg úr starvi ella verður burturvíst.

Reiðarin hevur skyldu til skrivliga at kunna um omanfyri nevndu afturgjaldingarreglur. Skeiðsútreiðslurnar eru kostnaðurin fyri skeiðini, ferðing og uppihald.

5. **Sáttmálin longdur**

Í grein 15 í høvuðssáttmálanum millum Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Sjómannadeild FFs verður "2023" broytt til "2025", og "2025" broytt til "2027". Gildiskomurnar í sersáttmálunum verða dagførdar samsvarandi.

**Tórshavn, 18. mars 2025**

Fyri Reiðarafelagið fyri Handilsskip — Jens Meinhard Rasmussen, formaður

Fyri Føroya Fiskimannafelag — Jan Højgaard, formaður

# Váttan um fulltiknar dekkarar

Undirritaðu feløg vátta, at fulltiknir dekkarar, heimhoyrandi í Føroyum, altíð fáa eina løn, sum í minsta lagi er kr. 1.400 hægri enn galdandi innplasering í lønartalvuni í kollektiva sáttmálanum.

Omanfyri nevnda áseting fær ikki virknað fyri fulltiknar dekkarar, ið longu nú fáa ein løn, sum uppfyllur treytirnar omanfyri.

**Tórshavn, 18. mars 2025**

__________________________________

Skansi Offshore, Jens Meinhard Rasmussen (stjóri)

__________________________________

Smyril Line, Jens Meinhard Rasmussen (stjóri)

Heini Kristiansen

__________________________________

Bakkafrost, Heini Kristiansen (starvsfólkaleiðari)